## Klumman

Eyðun Klakstein
blaðmaður
eydun@sosialurin.fo

# Strálur við styrki

Vit eru rættiliga takknemligir – vit føroyingar. Nú hevur sólin skinið í nakrar dagar, og fólk eru í so góðum lag, at um tað fór at regna nú og fram til jóla, so høvdu fólk helst pástaðið, at summarið var sera gott.

Tað er stuttligt og hugaligt, tá ið sólin fyrstu ferð kagar fram soleiðis av álvara. Fyrstu strálurnar eru ótrúliga sterkar, og alt fer upp at renna og veipa. Lør og armar daga fram, tá ið ullintu undirbuksirnar og kotini verða løgd til síðis í nakrar dagar, og vit eru øll um at kóðna. 16 hitastig eru heldur ikki so galið, tá ið mann meginpartin av árinum ballar seg inn í troyggjur og jakkar við hitalagi um frostmarki.

Datt inn á eina bensinstøð í Havnini mánadagin, og har var long kø frammanfyri diskin. Aftanfyri diskin runnu tvær ungar kvinnur aftur og fram millum kassan og ísmaskinuna. Samlibandsísur varð tveittur um diskin uttan steðg, so at fólk orkaðu at fara út í sólina aftur.

Og soleiðis er, tá ið summarið vísir seg onkra lítla løtu – fólk fara til stroks, grillirnar verða togaðar út í túnið, matroykurin stendur um geilar og tún, býurin verður málaður reyður ella hvítur, og fólk flenna býtt eftir ongum.

Um tað hóast virkar eitt sindur komiskt tað heila, so er tað í øllum førum gott, at humørið var eitt kvink rætta vegin, styttri er til smílið og minni grenj er at hoyra. Um tað ikki kann verða øðrvísi, lat tað so bara verða í løtum, at vit ordiliga leypa upp frá, halda summar og fegnast um, at landið er sera vakurt undir eini bakandi sól – eisini hóast bakarovnurin bert stendur á fjórðingshita...

umborð

# Á brúnni eitt langt sjólív

**- Saman við øðrum skipi, vóru vit teir fyrstu, sum fiskaðu rækjur við Labrador um veturin. Hetta var ein ógvuliga spennandi tíð. Ofta lógu vit fastir í ísinum í einar 2-3 dagar, sigur Hans í Líðini**

**Hans Joensen, Hans í Líðini í Vági, sum hann verður róptur, fór fyrstu ferð til skips sum 15 ára gamal. Fyrsti túrurin var við línubátinum Jógvani á Gørðunum við Arna Dahl í Vági sum skipara. Meðan Hans var við, gjørdu teir tveir túrar í Íslandi og ein á Flemmish Kap**

## Umborð

Vilmund Jacobsen
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo



*- Ferðin við sluppuni Jóhonnu til Íslands at keypa fisk og niður til Aberdeen at selja, var sera áhugaverd og hugtakandi, sigur Hans í Líðini Mynd: Hans Dávid Dam*

Eftir túrarnar við Jógvani, var hann hálvt annað ár umborð á norskum línubáti.

Árini fram til 1976, tá hann fór á skiparaskúla í Havn, var hann fyrst við trolara úr Honningsvåg og síðan við øðrum norskum trolarum.

Í 1979 gjørdist Hans skipsførari. Longu sum 22 ára gamal í summarfrítíðini í 1977 førdi hann fyrstu ferð bát, 20 tonsaran, Vesturberg.

Sum blaðungur 2-3 ár seinni gjørdist Hans í 1980 skipari umborð á lítlu Brimborg, sum hann rópar hana. Men her var hann ikki leingi, tí longu árið eftir, tá nýggja Varðborg kom, fór hann at føra hana, og her stóð hann á brúnni fram til november mánaða í 1985.

Í hesum tíðarskeiði var hann ein einstakan túr sum stýrimaður við einum bornholmara.

Eftir tíðina við Varðborg, bar leiðin nú á rækjuveiði – fyrst við einum lítlum báti av Bornholm.

- Hetta var tíðliiga um várið í 1986. Vit royndu í Eysturgrønlandi. Báturin var neyvan longri enn einar 38 metrar – ella sum ein av okkara smáu ísfiskatrolarum. Vit vóru 12 mans við skipinum

Hann heldur, at skipið var so lítið, at tað kundi ikki fáa skaða, hóast veðrið ikki altíð var so tespiligt.

- Eg haldi, at vit slongdust bara aftur og fram millum aldurnar, sigur hann.

Seinni sama ár fór Hans við einum stórum donskum rækjutrolara.

Í fyrstani fiskaðu teir undir grønlendskum flaggi og seinni undir kanadiskum, samstundis sum kanadiumenn keyptu ognarpart í skipinum.

- Saman við einum øðrum rækjubáti, sum danir eisini áttu, vóru vit fyrsta skipini, sum fiskaði rækjur um veturin við Labrador. Vanliga varð ikki fiskað á hesum leiðum í vetrarhálvuni, tí tá kundi ísurin vera ein hóttan. Soleiðis fiskaðu kanadiarar heldur ikki rækjur í ringu árstíðini.

Hann ásannar, at hetta var ein ógvuliga spennandi tíð.

- Ofta lá man frystur fastur í ísinum í einar 2-3 dagar. Men øtlaði hann veðrið av landsynningi ella eystri, kom alda í sjógvin og breyt ísin upp, so vit aftur fingu fiska.

Hann sigur, at hetta var eitt einastandandi gott skip.

- Eg var við hesum skipi árini í 1986 og 1987 og um várið í 1988.

Uppundir endan av hesi tíðini, komu eitt nú føroysk rækjuskip á hesar leiðir.

- Hetta var ein ógvuliga spennandi tíð, og tað gekk óføra væl. Tað var spennandi at vita, hvussu nógv tú kundi fiska, áðrenn skipið frysti fast aftur.

Hann sigur, at teir gjørdu fleiri rættiliga góðar túrar.

- Skipið tók 408 tons, og hesa veiði kundu vit onkuntíð fiska eftir 12-14 døgum. Ein slíkan túr høvdu vit næstan bara kókaðar rækjur og sonevndar Japans-rækjur.

Hans í Líðini sigur seg minnast, at so væl gekst, at teir hesi bæði árini fiskaðu fyri einar 82-84 miljónir krónur um árið – og tað var nógvur peningur tá.

Í byrjanini vóru teir 32 mans við skipinum, harav einir 12 vóru føroyingar.

- Flestu føroyingarnir fóru av triðja árið, tí klutur kom í við kanadiumenninar, sum vóru við skipinum.

Hans sigur, at yvirmenninir á brúnni, dekkarar og verksmiðjuleiðarar vóru føroyingar og maskinstjórarnir danir.

- Árið eftir, at vit vóru farnir av, fiskaði skipið bert fyri einar 19-20 miljónir krónur – og fór á húsagang.

Hann leggur aftrat, at skeiva gongdin stóðst ikki av, at minni var at fáa, tí onnur skip fiskaðu eisini væl hetta árið.

Hann minnist aftur á rækjufiskiskapin við Labrador, sum eina ógvuliga spennandi tíð. ikki minst, tá teir royndu í Hudsonflógvanum. Tað var bara at dryppa trolið út í, kanska í einar 3-4 minuttir, so var tað fult av rækjum!

Hann sigur, at rækjurnar á hesi leiðini vóru av øðrum slagi, men góður prísur fekst fyri tær.

Í 1986 var Hans ein avloysaratúr sum skipari við einum øðrum grønlendskum rækjutrolara.

Á heysti 1988 fór hann at sigla fyri eitt grønlendskt felag, og her sigldi hann hjá sama reiðaríi, til hann gavst seint í 2002.

- Við hesum seinasta skipinum, eg sigldi við í Grønlandi, Markus-J, vóru vit tveir føroyskir skiparar sum loystu hvønn annan av – Klæmint Olsen av Sandi og eg sjálvur.

Hann sigur, at grønlendska felagið fekk skipið í oktober í 1995 og í desember 1999 – ella fýra ár seinni – var skipið, sum kostaði stívliga 100 miljónir krónur at byggja, longu útgoldið.

- Grønlendingar áttu skipið saman við dønum, sum búðu í Grønlandi.

Hans sigur, at tá hann sigldi í Grønlandi, setti hann sær fyri at gevast at sigla, áðrenn hann fylti fimti.

- Skuldi eg royna okkurt annað í lívinum, kundi eg ikki halda fram at sigla. Men, sum hann tekur til:

- Hevur tú verið sjómaður og hevur siglt ein stóran part av tínum góða lívi, er torført at gevast heilt. Saman við bróðuri mínum, Kaj, hava vit øll árini frá 1992-2003 havt ein 34 tons stóran útróðrarbát.

Hann sigur, at teir seldu bátin eina og aleina, tí teir ikki fingu fólk.

- Nú fáist eg við lemmar í Vági, har eg eigi lut í felagnum, Sp/f Rock.

- Eg havi verið í hesi "bransjuni", síðan eg gavst at sigla, sigur hann.

Hans í Líðini hevur verið í nevndini aftanfyri sluppina Jóhonnu, síðan felagið varð stovnað í 1981.

Hann hevur soleiðis eisini verið skipari á Jóhonnu, og serliga er tað tann eina ferðin, sum hevur fylt meira enn aðrar í hansara hugaheimi.

- Hetta var ferðin við Jóhonnu til Íslands at keypa fisk, sum vit førdu niður til Aberdeen at selja. Abbi mín, vanliga róptur Jacob í Líð – ella Jóan Jacob Joensen – var við Jóhonnu at kalla øll stríðsárini. Hetta var ein sera hugtakandi túrur, har einir tveir ella tríggir av manningini lógu um 75 – og tann elsti, Sigurd Joensen í Oyndarfirði, tá var 85 ár.

Hann leggur aftrat, at Sigurd var sum ein unglingi á dekkinum hendan túrin, har teir leitaðu aftur á slóðina hjá teimum gomlu.

Hans í Líðini gavst í Grønlandi sum 48 ára gamal, og í dag er hann 52.